# Vilja samstarva við

**Tá føroysk lesandi heita á fyritøkur í Føroyum, um at samstarva við tey um bachelor- ella kandidatuppgávur, er tað sjáldan tey fáa nakað svar. Soleiðis fer nógv vitan fyri skeyti og vandin er, at tey lesandi ikki koma heim, sigur felagsskapurin fyri tey føroysku lesandi á Copenhagen Business School. Tey virka fyri einum tættari samstarvi millum lesandi og vinnulívið í Føroyum**



Rólant Waag Dam

Tey hittast javnan, fólkini, sum manna nevndina í Samvinnuni, ið er felagsskapurin hjá teimum føroysku lesandi á handilsháskúlanum í Keypmannahavn. Men hjá teimum er annað er enn øl og sosial samvera á skránni.

Beint nú viðgera tey, hvussu tey kunnu virka fyri, at føroyskar fyritøkur lata seg upp og vilja samstarva við tey lesandi, sum skulu skriva bachelor- ella kandidatuppgávur. Royndir teirra siga nevniliga, at føroyskar fyritøkur sum heild eru alt annað enn samstarvssinnaðar.

– Tað er eitt stórt svart hol, sum vit als ikki fáa innlit í. Nógvar fyritøkur ikki so frægt sum svara aftur, tá vit senda teimum spurningar ella áheitanir um samstarv, sigur Páll Oddur Rubeksen, nevndarlimur í Samvinnuni.

Hetta er ikki einans ein trupulleiki fyri tey lesandi, sum ynskja at brúka tíð og orku upp á at analysera og viðgera føroyskar fyritøkur, roknskap teirra ella hvussu tær eru samansettar.

**» Vit, sum eru undir útbúgving, sita við nýggjastu vitanini á økinum. Men tað er líkt til, at føroysku fyritøkurnar ikki síggja virðið í hesum**



– Fyritøkurnar, sum ikki vilja samstarva, missa eina øgiliga vitan. Tá okkara limir skriva uppgávur, sita tey fulla tíð í tríggjar mánaðir, arbeiða og analysera. Men vitanina og nýggju vinklarnir, tey kunnu koma við, fáa nógvar føroyskar fyritøkur ikki gagn av, tá tey ikki vilja samstarva við okkum, vísir Eva Skeel Nolsø, forkvinna í felagnum, á.

*Tróndur Hentze Sørensen og hini í samvinnuni halda, at føroysku fyritøkurnar ikki vísa neyðugu virðingina fyri vitanini tey føroysku lesandi á CBS hava*
*Mynd: Rólant Waag Dam*

### Síggja ikki virði í lesandi

Í nevndini undrast tey á, hví flestu føroysku fyritøkurnar, tey hava sett seg í samband við, annað hvørt eru avvísandi ella als ikki svara teirra fyrispurningum.

– Vit, sum eru undir útbúgving, sita við nýggjastu vitanini á økinum. Men tað er líkt til, at føroysku fyritøkurnar ikki síggja virði í hesum, sigur Tróndur Hentze Søren, sum eisini er við í nevndini. Tað er í beinari andsøgn við gongdina í Danmark, har fyritøkur heldur enn gjarna samstarva við lesandi, sum skriva bachelor- og kandidatuppgávur.

– Júst nú lýsir Danske Bank eftir 36 lesandi, sum skulu skriva upp-